# Dimmalætting lýgur

JOHN JOHANNESSEN



**Lygn er nýggja amboðið hjá gomlu Dimmu í royndini at sláa stórar gølusøgur upp á forsíðuni**

“Tað eydnaðist ikki Dimmalætting at fáa fatur á John Johannessen fyri evstamark hjá blaðnum í dag”

Hesa umberingina brúkti Dimmalætting, tá hon í útgávu nr. 124 týsdagin 1. juli 2008 valdi at hongja familju mína og meg út á forsíðuni við dulnevndum keldum sum grundarlagi, uttan at hava kannað veruligu umstøðurnar og uttan at hava biðið um mínar viðmerkingar, eins og góður fjølmiðlasiður er.

Dimmalætting leyg, tá hon skrivaði, at tað ikki eydnaðist at fáa fatur á mær. Tí Dimmalætting ringdi ikki til mín. Hetta gjørdi eg blaðstjóran varugan við, og klokkan 15.08 týsdagin ringdi hann so til mín, har hann helt fast við, at Dimma fleiri ferðir hevði roynt at fingið fatur á mær, men at eg svaraði ikki.

Mikudagin lýgur Dimma aftur. Hesaferð er tað sjálvur blaðstjórin, sum undir einari viðmerking frá mær á síðu 10, útgávu nr. 125, 2. juli 2008 skrivar: “Harra John Johannessen! Dimmalætting fekk ikki fatur á tær, hóast ringt varð fleiri ferðir. Gøla? Løgtingsmaður seinkar flogfari. Hvat heldur tú sjálvur?”

Her lýgur sjálvur blaðstjórin og prógvar, at nýggja amboðið hjá gomlu Dimmu er sjálv lygnin.

Tíbetur hevur Vodafone fingið loyvi frá Fjarskiftiseftirlitinum at kanna allar inngangandi samrøður til mína telefon frá mánadegnum fyrrapart, tá vit lendu í Vágum, og til týskvøldið eftir at Dimmalætting var borin út. Listin hjá Vodafone og Fjarskiftiseftirlitinum prógvar mítt uppáhald. Dimmalætting lýgur og hevur bert ringt til mín týsdagin 1. juli klokkan 15.08, eftir at eg hevði lagt boð til blaðstjóran um at ringja til mín.

Mitt telefonnummar er at finna í telefonbókini, á www.nummar.fo, á heimasíðu løgtingsins, á mínari heimasíðu og á heimasíðu Javnaðarflokssins. Tað skuldi ikki verið so trupult hjá Dimmu at leita tað fram.

Sí hjálagda lista niðanfyri frá Fjarskiftiseftirlitinum og Vodafone og met um nýggja trúvirðið hjá gomlu Dimmu. Telefonirnar hjá Dimmu hava 5412, sum fýra tey fyrstu tølini. Tvey tey seinastu tølini eru tikin burtur úr uppringingum frá vinfólkum, fyri at verja teirra identitet í hesum máli.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Móttikið | 522242 | 4563** | 2008.jun.30 12:11:45 PM | |
| Móttikið | 522242 | 211489 | 2008.jun.30 12:40:03 PM | floksskrivarin |
| Útgangandi | 522242 | 202020 | 2008.jun.30 12:57:25 PM | |
| Inngangandi | 522242 | 202020 | 2008.jun.30 01:01:31 PM | |
| Útgangandi | 522242 | DULT | 2008.jun.30 08:26:43 PM | |
| Móttikið | 522242 | 211489 | 2008.jul.01 09:36:09 AM | floksskrivarin |
| **Útgangandi** | **522242** | **541234** | **2008.jul.01 02:51:45 PM** | **Her ringi eg til blaðstjóran á Dimmu** |
| **Móttikið** | **522242** | **541234** | **2008.jul.01 03:08:31 PM** | **Her ringir blaðstjórin á Dimmu aftur til mín** |
| Móttikið | 522242 | 3020** | 2008.jul.01 09:11:50 PM | |
| Móttikið | 522242 | 4418** | 2008.jul.01 10:09:48 PM | |
| Móttikið | 522242 | DULT | 2008.jul.01 10:53:32 PM | |

Afturat hesum hevur telefonin hjá mær sjálv skrásett nøkur uppkall, har eg ikki havi svarað telefonini. Tey eru hesi:

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| ósvarað | 522242 | 2296** | 2008.jun.30 08:26:?? PM | |
| ósvarað | 522242 | 4577** | 2008.jul.01 10:58:?? AM | |
| ósvarað | 522242 | 4577** | 2008.jul.01 12:07:?? PM | |
| ósvarað | 522242 | 4577** | 2008.jul.01 01:09:?? PM | |
| ósvarað | 522242 | DULT | 2008.jul.01 02:27:?? PM | |
| ósvarað | 522242 | 211489 | 2008.jul.01 02:30:?? PM | floksskrivarin |

# Eitt og annað

**NIELS J. ERLINGSSON**
Akureyri

Tá ein hevur búð uttanlands í yvir fimmti ár er ymist sum vil gloymast, annað er sum ígjögnum árini hevur havt so stór broyting við sær, eitt nú föroyska málið, tað er so mikið sum málið hevur tikið av broytingum, tað so at nógv orð skiljast vart um tey ikki hevði verið sett saman við öðrum orðum í settningar.

Eitt er tað sum eg eigi ikki so væl við at skilja, tað eru lýsingarorðini stórt - og nógv ofta sær ein at sagt er so mikið stórt ella so mikið nógv, er ikki nokk at siga so stórt og so nógv.

Annað orð virkar so undarliga at hoyra ella sýggja, tað er nýtsla oftar sagt um hús ella bygging er tikin í nytslu,hetta ljóðar so undarliga tí ein sær mætvöru nýtast, ella okkurt sum minkar og hvörvur, men hús og bygging er tikin í brúk tá hon er liðug, nú eri eg kanska komin út á hálan ís tí fyrir um 60 árum var skúlin úti á bygd ikki so heilt av tí stóra, men eg vóni at har hevur verið mikið bött um.

Men eitt má tó sigast, at vart er so lítil tjóð sum föroyar íð kan státa av at eiga egið móðurmál og tað tó hon hevur ikki átt egið ritmál í meir en innan við 200 ár, frásögusnildin og kvæðini eiga mestu takkir fyri varveitslu málsins, men sjálvandi broytist málið, vit sýggja tað best her í Íslandi hvussi málið broytist, nú er komin nyggj týðing á Bíbliuni, seinasta týðing var gjörd í 1981, og er tað stórur munur á tíðingini nú og tá og er tá munurin helst í framsetning á ritmáli.

**Föroysk tíðindi til útisetar**

Ég havi eina tíð verið haldari av Sosialinum og kostaði haldaragjaldið 500 f.kr. um ársfjórðingin nú hendan dagin fekk eg bræv um at haldaragjaldið fyri fólk í útlondum skuldi hereftir gjalda 100 kr. fyri ársfjórðingin, hetta er sum sagt, blaðið hækkar um 100%, eg vil ikki bera ímóti at dýrt kann vera at senda blaðpakkan við 5 blöðum til útlanda, tó haldi eg, at hetta má vera óhoyrt stökk í einum lopi, so eg má siga, at tað gongur ikki, tí tað sum eg havi áhuga fyri eru tíðindi heimanfrá, og í hvörjum blaðið er at eg haldi ikki meir en 15-20% áhugaverd tíðindi frá Föroyum hitt er snakk ella lýsingar.

Tað sum kundi verið áhugavert var um saman vóru tikin föroysk týðindi og givið út eina ferð um vikuna og sent til útisetar og tey, sum vildu fylgjast við föroyskum viðurskiftum.

Eitt er tað sum eg komi til at sakna í Sosialinum, tað eru skriv Óla Jacobsen um ymist gamalt ótrúliga áhugavert.

**Skerpikjöt spik og turt tvöst**

Eg var fegin, tá bóndi av oyggj einari á Breiðafjörðinum hevði samband við meg, tí hann hoyrdi at mær gekk illa at turka kjöt her á Akureyri, bóndin sendi mær part úr kjógvi til at sanna at kjöti hjá honum var gott, hetta var fyri 5 árum og hevur hesin bóndi turka fyri meg kjöt síðan, eg vil nú ikki siga at allt er líka gott, men tað er sumt sum alls ikki er verri en föroyska skerpikjötið, tað tekur longri tí at torna.

Eg havi eisini fingið frá manninum ræst kjöt avbera gott, tað hava eisini aðrir föroyingar og aðrir sum dáma turt kjöt fingið kjöt frá sama bónda.

Í fjör skrivaði eg til sjávarútvegs og landbúnaðar ráðuneytið og sökti um loyvi til at fá at flyta inn frá Föroyum skerpikjöt, tvöst (turt) og spik eg roknaði ikki við at hoyra frá teimum aftur, men viti menn svar kom at eg kundi fáa loyvi fyri lítlari nögð til egi brúk, men tí fylgði krava um at ymsir papírar og attestir máttu fylgja við um so sum sunnheitsattest viðurkent slaktarí, eg fekk systur mína heima at skaffa eitt kjógv, lítið eitt av tvösti og eittsindur av spiki, hetta kom allt uttan nakað sum helst.

Tí sendi eg í február hetta árið teldupost til somu stovnun og bað nú um loyvi fyri tvösti og spiki, eg roknaði ikki við at fáa svar tí eg hevði ikki hoyrt frá teimum um miðjan júni,men um 20. júni kom svar at eg kundi flyta inn til egið brúk lítið eitt av turrun tvösti og spiki, og somu reglur skuldi haldast um váttan og onnur skriv um uppruna vörurnar og frískleika.

So eg eri fegin at tað kann lata seg gera at fáa föroyskan mat higar, kanska er tað Hoyvíkssáttmálin sum loysir um hafti sum verið hevur.

# Ongin gloymdur

Sjálvstýrisflokkurin heilsar stiginum hjá landstýrismanninum í fíggjarmálum vælkomnum og takkar fyri kunningina um pensjónsreform, ið partarnir á arbeiðsmarknaðinum og politiska skipanin vórðu boðin til.

Føroyingar eru seinir á sjóvarfallinum við pensjónsreformi í mun til Ísland og Danmark, og neyðugt er at fremja tiltøk til tess at tryggja, at hvør einstakur løntakari skal gjalda hóskandi prosentpart av løn síni til pensjón.

Framrokningar vísa, at færri virkin fólk verða fyri hvønn pensjónist. Verður onki gjørt, vaksa eldraútreiðslurnar heilt upp í 21% av BTÚ í 2050.

Tí mugu arbeiðsmarknaðurin og politikarar í felag finna semju um framtíðar pensjónskipanina. Týðandi partar av henni mugu verða krøv um uppsparing, líðandi hægri pensjónsaldur og munagóð almenn pensjón til teirra, ið ikki hava møguleikan at spara upp.

**Nøkur stig**

Beinanvegin má inntøkumarkið fyri mótrokning í fólkapensjónini hækka og mótrokningarprosentið lækka. Sjálvstýrisflokkurin hevur uppskot klárt um hetta, ið fer at eggja teimum virkisføru eldru at halda fram á arbeiðsmarknaðinum sum longst.

Hækkanin í fólkapensjónini má fyrst og fremst verða í viðbótini, so tey uttan egna uppsparing fáa meiri munandi styrk. Men samstundis mugu vit krevja, at øll ið orka at spara skulu spara.

**Samhaldsfasti varðveitast**

Samhaldsfasti er ikki fólkapensjón men arbeiðsmarknaðargjald, ið arbeiðsgevarar og løntakarar gjalda í grunn. Arbeiðsmarknaðurin fíggjar skipanina. Politikarar eiga at halda seg burtur frá hesi skipan og mugu ikki sleppa at marknaðarføra Samhaldsfasta sum fólkapensjón. Serliga seinastu 4 árini hevur grunnurin fingið leiklutin sum einasta pensjónshækkanin.

Samhaldsfasti skal varðveitast sum óheft arbeiðsmarknaðarpensjón.

**Vit staðfesta at:**

**1**. Samhaldsfasti skal varðveitast sum óheft arbeiðsmarknaðarpensjón, ið ikki skal avloysa almennu pensjónina, men skal verða tað ískoyti til pensjónina, ið hann av fyrstan tíð var tilætlaður.

**2**. Samhaldsfasti má samskipast, so hann lýkur treytirnar fyri ásetingunum í Norðurlendsku Konventiónini – fólk skulu fáa hann við sær, um tey flyta.

**3**. Krøv mugu setast um pensjónsuppsparing, men til øll á arbeiðsmarknaðinum hava fingið nøktandi uppsparing, skulu vit tryggja, at ongin dettur niðurímillum við at hækka viðbótina til almennu fólkapensjónina.

4. Onnur stig mugu takast, serliga at minka mótrokning hjá pensjonistum ið framvegis arbeiða, umframt at loyvi fólki at útseta fólkapensjónina afturfyri hægri pensjón seinni.

5. Sjálvstýrisflokkurin vil positivt viðgera breiða semju um pensjónsreform, men minnir á, at eisini pensjónsreformur krevur vakstrarbúskap, serliga at vit fáa ungdómin at støðast og duga at menna útbúgving, gransking og nýggjar vinnur.

**Vegna Sjálvstýrisflokkin**

Kári P. Højgaard
Floksformaður

Kári á Rógvi
Næstformaður